# Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 17 | 14 - 3 | 46 | 20 | 26 | 20 |
| 2 | Mjølnir | 17 | 13 - 4 | 45 | 17 | 28 | 19 |
| 3 | TB | 17 | 13 - 4 | 44 | 15 | 29 | 18 |
| 4 | Dráttur | 17 | 7 - 10 | 26 | 38 | -12 | 9 |
| 5 | Fleyr | 17 | 3 - 14 | 13 | 44 | -31 | 5 |
| 6 | KÍF | 17 | 1 - 16 | 8 | 48 | -40 | 1 |

### Meistaradeild, menn

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 14 | 12 - 2 | 38 | 8 | 30 | 16 |
| 2 | SÍ | 14 | 8 - 6 | 26 | 21 | 5 | 13 |
| 3 | Mjølnir | 14 | 8 - 6 | 27 | 23 | 4 | 11 |
| 4 | Fram | 13 | 6 - 7 | 22 | 23 | -1 | 8 |
| 5 | Fleyr | 13 | 0 - 13 | 1 | 39 | -38 | 0 |

# Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 5 | 5 - 0 - 0 | 448 | 359 | 89 | 19 |
| 2 | VÍF | 6 | 4 - 1 - 1 | 416 | 342 | 74 | 17 |
| 3 | Stjørnan | 5 | 1 - 1 - 3 | 367 | 371 | -4 | 11 |
| 4 | Kyndil | 5 | 2 - 1 - 2 | 416 | 423 | -7 | 11 |
| 5 | StÍF | 4 | 1 - 1 - 2 | 374 | 402 | -28 | 9 |
| 6 | Neistin | 5 | 1 - 0 - 4 | 332 | 367 | -35 | 7 |
| 7 | Tjaldur | 4 | 1 - 0 - 3 | 317 | 406 | -89 | 3 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 5 | 4 - 0 - 1 | 530 | 432 | 98 | 17 |
| 2 | StÍF | 4 | 2 - 2 - 0 | 454 | 394 | 60 | 15 |
| 3 | Neistin | 4 | 1 - 1 - 2 | 447 | 428 | 19 | 12 |
| 4 | Kyndil | 4 | 1 - 2 - 1 | 427 | 427 | 0 | 10 |
| 5 | KÍF | 5 | 1 - 2 - 2 | 440 | 471 | -31 | 9 |
| 6 | H71 | 4 | 2 - 0 - 2 | 409 | 463 | -54 | 7 |
| 7 | Tjaldur | 4 | 0 - 1 - 3 | 395 | 487 | -92 | 4 |

# Trupult hjá Holte

**Føroyska útisetafelagið tapti fyri Marienlyst, og nú verður trupult at vinna seg fram til hálvfinalurnar**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Holte spældi um vikuskiftið móti Marienlyst Volley. Ein dystur, sum mest sum kundi tryggja Bárði Mikkelsen og liðfeløgunum eitt pláss í hálvfinaluni, um teir vunnu dystin. Hinvegin skuldi Marienlyst vinna dystin, um teir skuldu hava møguleikar at røkka hálvfinaluni.

Og Marienlyst vann dystin. Fyrrverandi felagið hjá Bárði tók tey bæði fyrstu settini í dystinum, men tá Holte so aftur gjørdi ein vørr, tóktust teir hava fingið fatur á rætta endanum. Í øllum førum mundu teir við tveimum settum á rað hava sálarliga yvirtakið, tá teir fóru undir javnbrótaran, men her svaraðu gestirnir aftur. Marienlyst vann hetta settið 15-9, og leyp sostatt uppeftir á stigatalvuni, har teir nú standa við góðum møguleikum fyri at røkka víðari í kappingini.

Hóast tapið, so er ikki alt enn mist hjá Holte, men hinvegin eru so avgjørt ikki ráð til fleiri kiksarar. Komandi leygardag skulu teir á útivølli royna seg móti Skovbakken Volley.

# Tjaldur skal ferðast

**Bæði kvinnur og menn hjá Tjaldri skulu royna seg á útivølli mikudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Hoyvíkingar hava møguleikan at leggja seg heilt nær bronsustríðnum, um teir vinna heimadystin á Tjaldur mikukvøldið*

Tveir hondbóltsdystir verða leiktir mikukvøldið. Og í báðum førum skal Tjaldur royna at lyfta seg nakað upp í botnstríðnum.

Ringast stendur til hjá kvinnunum, sum standa til at missa sína umboðan í bestu deildini. Tær skulu spæla grannauppgerð á Skála, har heimaliðið við einum sigri kann leggja seg út í bronsustríðið. Ein dystur, har StÍF uttan iva eru favorittar, men Tjaldur hevur hinvegin prógvað, at tær væl kunnu gera um seg, tá mest stendur á. Og nú stendur av álvara á.

Í Hoyvíkarhøllini verur dystur millum mansliðini hjá H71 og Tjaldri. Bæði liðini hava í endaspælinum gjørt væl meira um seg, enn tey gjørdu í grundspælinum, og nú er so spurningurin, hvussu tað fer at tørna út, tá liðini skulu takast innanhýsis. Hoyvíkingar kunnu við einum sigri koma heilt nær teimum liðunum, sum stríðast um bronsuna, men hinvegin kann Tjaldur við einum sigri taka seg heilt nær H71.

ÍF-Mjølnir 3-0 (25-20, 25-21, 25-22)

# Nú er stutt eftir

**Etir sigurin á Mjølni tørvar ÍF nú bert eitt stig fyri at vissa sær gullmerkini**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir ein lítlan niðurtúr miðskeiðis í endaspælinum, tykist tað nú, sum um ÍF aftur er í ferð við at staðfesta støðuna sum sterkasta mansliðið í landinum.

Tvey tap á rað syrgdu annars fyri, at fyrst og fremst klaksvíkingar av álvara komu í part í FM-stríðnum, sum annars mest av øllum hevði mint um ein avgreiðsluspurning fram til tá.

Skuldu Mjølnir framvegis hava møguleikan at blanda seg, so skuldu teir eisini vinna dystin á Kambsdali sunnudgin, men tó at tað í øllum trimum settunum ikki var so øgiliga langt frá, so megnaðu teir ongan tíð av álvara at hótta heimaliðið.

Styrkin hjá ÍF hevur í alt ár verið - umframt sterkar einstaklingar – at teir hava nógv ta størstu breiddina í spælinum, og soleiðis var eisini sunnudagin. Møguleikarnir at variera spælið eru tí nógv størri, og tað var helst fyrst og fremst hetta, sum feldi Mjølnir sunnudagin. Klaksvíkingarnir vóru hampuliga væl við fyrsta settið, men tá ÍF so líka sum hevði peilað seg inn á mótstøðuna, var einki at gera.

### Eitt stig restar

Við sigrinum á Mjølni syrgdi ÍF fyri, at teir nú bert eru millimtrar frá at tryggja sær FM-heitið. Fáa teir stig burtur úr bara øðrum av teimum báðum eftirverandi dystunum, so er slagið vunnið, men hinvegin er talan á ongan hátt um lættar dystir.

Fyrst skulu teir til Sørvágs, har SÍ uttan iva vil hevna tepra tapið í steypafinaluni, og samstundis halda fast í sínum møguleika fyri FM, og síðani gongur leiðin til Havnar, har Fram fleiri ferðir áður hevur givið ÍF ein skarpan gang.

Lætt verður tað so undir ongum umstøðum hjá ÍF, men hóast tað, so mugu teir finna seg í leiklutinum sum favorittar. Sum teir hava spælt í ár, so er tað í øllum førum væntandi, at stig fást burturúr, men hinvegin kann hugsast, at nervarnir kunnu spæla eitt puss í seinasta dystinum, um teir ikki fáa nóg nógv burturúr, tá teir annað vikuskifti vitja í Sørvági.

Fram-SÍ 0-3 (23-25, 13-25, 17-25)

# SÍ hevur møguleikan

**Sørvingar tykjast vilja gera alt til tess at tryggja eina spennandi kapping, og sunnudagin sópaðu teir Fram til viks**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

SÍ er nú einasta liðið, sum hevur møguleikan at hótta ÍF á fremsta plássinum. Hetta stendur greitt, eftir at ÍF koppaði Mjølni á Kambsdali.

Fyri at halda fast um sín møguleika, skuldu sørvingar vinna útidystin á Fram, og ta uppgávuna loystu teir til reint UG.

Fyrsta settið var annars eitt av teimum, har marginalarnir vóru teir avgerandi, men tá alt kom til alt, fullu hesir til fyrimuns fyri gestirnir, og so tóku sørvingar av.

Við spæli, sum partvíst minti um tað, sum teir sýndu í steypafinaluni, sópaðu teir Fram av gólvinum tey bæði næstu settini, og nú er av álvara lagt upp til stórdyst, tá ÍF vitjar í Sørvági annað vikuskifti.

Vinnur ÍF tann dystin, so er meistarheitið víst, men hinvegin kann SÍ skapa heilt nógvan spenning, um teir megna at hevna tapði frá steypafinaluni. Um so er, so er bert eitt stig á muni millum partarnar, og so kann Fram kortini fáa ein avgerandi leiklut, tá teir í seinasta dystinum á árinum taka ímóti ÍF.

Sørvingar skulu tó royna seg ímóti Fleyr, men tað er so ikki væntandi, at tann dysturin fer at geva trupulleikar, um SÍ bert tekur uppgávuna í nóg stórum álvara.



# Eitt met sett í Klaksvík



*Andrass Thomsen úr Havnar Svimjifelag setti mett á 400 metra teininum í frísvimjing um vikuskiftið*
*Mynd: Øssur Mohr*

**Andras Thomsen setti føroyskt met á 400 m frí, tá ægirstevnan varð hildin um vikuskiftið**

SVIMJING
*Jákup Mørk*

Eitt føroyskt met og tvey bólkamet. Tað var partur av úrslitnum, tá Ægirstevnan varð hildin í Klaksvík um vikuskiftið.

Metið átti Andrass Thomsen úr Havn, sum svam 400 m frí í tíðini 4.08.44, og tey bæði bólkametini áttu ávíkavist Sára Ejdesgaard av Tvøroyri í 50 m rygg og stafettin hjá havnarkvinnunum í 4X50 m frí.

Samlaða býtið av heiðursmerkjum gjørdist hetta:

| | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| Tvøroyrar Svimjifelag | 15 | 7 | 4 |
| Havnar Svimjifelag | 10 | 13 | 11 |
| Ægir | 3 | 3 | 4 |
| Flot | 2 | 1 | 2 |
| Fuglafjarðar Svimjifelag | 0 | 4 | 5 |
| Skeggjar | 0 | 1 | 2 |

# Úrslit úr Ægir-stevnuni

**200 m. blandað kvinnur**
1 Sára Ejdesgaard TS 2.39.0
2 Katrin Sørensen TS 2.41.6
3 Karina Petersen Skeggjar 2.45.7

**200 m. blandað menn**
1 Dia Jacobsen HS 2.21.0
2 Andrass Thomsen HS 2.24.2
3 Jóannes á Fløtti HS 2.25.5

**50 m. firvald kvinnur**
1 Benthe S. Andersen TS 0.32.1
2 Shaila millum Garðarnar TS 0.32.3
3 Lisbeth L. Joensen HS 0.32.9

**50 m. firvald menn**
1 Kristian Olsen Ægir 0.28.9
Janus T. Olsen HS 0.28.9
3 Andrass Thomsen HS 0.29.0

**100 m. bringa kvinnur**
1 Benthe S. Andersen TS 1.21.6
2 Karina Petersen Skeggjar 1.24.0
3 Lisbeth L. Joensen HS 1.25.7

**100 m. bringa menn**
1 Per S. Hansen Flot 1.17.0
2 Jákup Ø. Mohr FS 1.18.5
3 Ottar í Hjøllum Flot 1.21.4

**50 m. rygg kvinnur**
1 Sára Ejdesgaard TS 0.34.26
2 Katrin Sørensen TS 0.34.4
3 Elida Bjarnadóttir HS 0.34.6

**50 m. rygg menn**
1 Janus T. Olsen HS 0.30.3
2 Jóannes á Fløtti HS 0.31.0
3 Kristian Olsen Ægir 0.31.6

**100 m. blandað kvinnur**
1 Benthe S. Andersen TS 1.13.0
2 Katrin Sørensen TS 1.14.3
3 Sára Ejdesgaard TS 1.16.4

**100 m. blandað menn**
1 Dia Jacobsen HS 1.06.5
2 Jóannes á Fløtti HS 1.07.9
3 Janus T. Olsen HS 1.08.0

**4 x 100 m. frí kvinnur**
1 Tvøroyrar Svimjifelag TS 4.21.2
Sára Ejdesgaard
Benthe S. Andersen
Katrin Sørensen
Shaila millum Garðarnar

2 Havnar Svimjifelag 1 HS 4.30.2
Annika Jacobsen
Rannvá Jacobsen
Helga Djurhuus
Lisbeth L. Joensen

3 Havnar Svimjifelag 3 HS 4.53.1
Guðrun Magnussen
Silja Strøm
Randi Jacobsen
Vár Jacobsen

**4 x 100 m. frí menn**
1 Havnar Svimjifelag 1 HS 4.01.7
Búi Rouch
Aksal H. Norðfoss
Janus T. Olsen
Dia Jacobsen

2 Havnar Svimjifelag 2 HS 4.04.1
Andrass Thomsen
Jóannes á Fløtti
Egil Gunnarson
Rúni Hansen

3 Fuglafjarðar Svimjifelag FS 4.10.9
Jákup Ø. Mohr
Sonni Eliasen
Johan Martin Poulsen
Pauli Ø. Mohr

**400 m. frí kvinnur**
1 Benthe S. Andersen TS 5.01.2
2 Guðrun Magnussen HS 5.08.5
3 Natalia Reinhardt Ægir 5.11.2

**400 m. frí menn**
1 Andrass Thomsen HS 4.08.44
2 Sonni eliasen FS 4.37.1
3 Egil Gunnarson HS 4.38.2

**100 m. firvald kvinnur**
1 Shaila millum Garðarnar TS 1.12.3
2 Natalia Reinhardt Ægir 1.15.5
3 Karina Petersen Skeggjar 1.22.9

**100 m. firvald menn**
1 Janus T. Olsen HS 1.06.9
2 Ottar í Hjøllum Flot 1.14.8
3 Beinir Danielsen Flot 1.18.3

**100 m. rygg kvinnur**
1 Katrin Sørensen TS 1.13.2
2 Rannvá Jacobsen HS 1.13.5
3 Sára Ejdesgaard TS 1.13.7

**100 m. rygg menn**
1 Jóannes á Fløtti HS 1.06.1
2 Janus T. Olsen HS 1.07.2
3 Jákup Ø. Mohr FS 1.13.2

**50 m. frí kvinnur**
1 Benthe S. Andersen TS 0.29.7
2 Shaila millum Garðarnar TS 0.29.8
3 Sára Ejdesgaard TS 0.30.0

**50 m. frí menn**
1 Kristian Olsen Ægir 0.25.2
2 Johan Martin Poulsen FS 0.26.4
3 Aksal Norðfoss HS 0.27.1

**4 x 50 m. blandað kvinnur**
1 Tvøroyrar Svimjifelag TS 2.14.8
Sára Ejdesgaard
Benthe S. Andersen
Shaila millum Garðarnar
Katrin Sørensen

2 Havnar Svimjifelag 1 HS 2.17.9
Elida Bjarnadóttir
Lisbeth Joensen
Helga Djurhuus
Rannvá Jacobsen

3 Havnar Svimjifelag 2 HS 2.28.9
Halla W. Reinert
Silja Strøm
Randi Jacobsen
Annika Jacobsen

**4 x 50 m. blandað menn**
1 Havnar Svimjifelag 1 HS 2.08.9
Búi Rouch
Aksal Norðfoss
Janus T. Olsen
Egil Gunnarson

2 Havnar Svimjifelag 2 HS 2.10.5
Jóannes á Fløtti
Rúni K. Hansen
Tróndur Olsson
Andrass Thomsen

3 Fuglafjarðar Svimjifelag FS 2.12.9
Pauli Ø. Mohr
Jákup Ø. Mohr
Johan Martin Poulsen
Sonni Eliasen

**400 m. blandað kvinnur**
1 Katrin Sørensen TS 5.46.6
2 Natalia Reinhardt Ægir 5.53.7

**400 m. blandað menn**
1 Janus T. Olsen HS 5.23.9

**100 m. frí kvinnur**
1 Benthe S. Andersen TS 1.03.9
2 Shaila millum Garðarnar TS 1.04.8
3 Sára Ejdesgaard TS 1.05.3

**100 m. frí menn**
1 Andrass Thomsen HS 0.55.1
2 Kristian Olsen Ægir 0.56.6
3 Sonni Eliasen FS 0.58.8

**50 m. bringa kvinnur**
1 Benthe S. Andersen TS 0.36.7
2 Lisbeth L. Joensen HS 0.39.1
3 Bára Joensen Ægir 0.39.5

**50 m. bringa menn**
1 Per S. Hansen Flot 0.34.8
2 Johan Martin Poulsen FS 0.34.9
3 Jákup Ø. Mohr FS 0.35.7

**4 x 50 m. frí kvinnur**
1 Tvøroyrar Svimjifelag TS 1.59.7
Shaila millum Garðarnar
Sára Ejdesgaard
Katrin Sørensen
Benthe S. Andersen

2 Havnar Svimjifelag 1 HS 2.04.57
Lisbeth L. Joensen
Helga Djurhuus
Halla W. Reinert
Annika Jacobsen

3 Ægir Ægir 2.11.2
Bára Joensen
Rúna Joensen
Karla Dánjalsson
Natalia Reinhardt

**4 x 50 m. frí menn**
1 Ægir Ægir 1.49.1
Kristian Olsen
Jákup Johansen
Dan Mikkelsen
Ulrik í Hjøllum

2 Havnar Svimjifelag 2 HS 1.51.2
Aksal H. Norðfoss
Andrass Thomsen
Tróndur Olsson
Egil Gunnarson

3 Havnar Svimjifelag 1 HS 1.52.5
Búi Rouch
Rúni K. Hansen
Janus T. Olsen
Kristian Martin Joensen